# Nevndarval í Føroya Astma- og Allergifelag

Eftir eykaaðalfundin hjá Føroyar Astma- og allergifelag varð nevndin skipað, og sær hon soleiðis út:

Snæbjørg Ørvarodd, Tórshavn, formaður
Sigrun Rubeksen, Tórshavn, næstformaður, kassameistari og skrivari
Elisabeth Z. Jacobsen, Klaksvík, nevndarlimur.
Tiltakslimir eru Birita Durhuus, Tórshavn og Petur Mortensen, Tórshavn

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum sum vístu okkum samkenslu og hjálpsemi, tá elskaði maður, pápi, abbi, verfaðir, sonur og bróðir

**Poul Johannes Hansen**
**Hósvík**
f. 22/1-1952 d. 8/2- 2001

lá sjúkur, doyði og var jarðaður. Tøkk til starvsfólkini á E3 fyri tíðina hann var hjá tykkum. Tøkk til Eiðis lækna og heimasjúkrasystrarnar, ið gjørdu tað møguligt hjá honum at vera heima til tað seinasta. Takk til prest, kirkjutænarar, sangarar og tit, sum hjálptu til við ervinum. Tøkk fyri blómur og kransar og takk tit mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað. Hjartaliga takk fyri ta stóru peningagávu, ið kom inn til Nýrafelagið.

*Fyri tey avvarðandi*
**Dagny**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Hjørdis Therkelsen**
**búsitandi í Tårnby,**
**ættað úr Kvívík**

doyði og varð jarðað. Tøkk fyri blómur og kransar, og tøkk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Poul, Ingibjørg, Einar og Elinborg**

## Tøkk

Hjartaliga verður takkað øllum fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá ið kæra systir mín, fastir og mostir okkara

**Jacobina Andrea Samuelsen**
**(Diddan í Horni í Havn)**

andaðist og varð jarðað.
Takk fyri blómur og kransar og fyri gávur til KFUK, og takk tit mongu, ið fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Eva**

# IRF økir skiljingina av ruski og burturkasti

TÍÐINDASKRIV
*frá IRF*

Í maimánaði fer IRF at skipa fyri, at pappír og papp, sum kann endurnýtast, verður heintað fyri seg. Í hesum tíðindaskrivinum verður greitt frá teimum týdningarmestu broytingunum, sum skulu gerast í innsavning av ruski og burturkasti frá húsarhaldum.

**Skiljing og endurnýtsla**
Ein stórur partur av okkara ruski og burturkasti kann brúkast aftur, um tað verður skilt á ein skinsaman hátt. Hesin parturin av burturkastinum er tí ikki burturkast, men týdningarmikið tilfeingi. Lyklaorðini eru skiljing og endurnýtsla.

Týdningarmesta skiljingin fer fram heima við hús og á bingjuplássunum. Skiljing av ruski og burturkasti, tá tað er savnað saman í stórar rúgvur, letur seg ikki gera.

**Tríggir posar til húsarhaldsrusk**
Fyrst í 2002 skulu øll húski í IRF-økinum hava tríggjar ruskposar; nevniliga ein gráan posa til tað vanliga burturkasti, ein hvítan pappírsposa til pappír og papp og ein grønan posa til serliga dálkandi burturkast.

**Tann grái ruskposin**
Tann grái ruskposin skal brúkast til tað dagliga ruski frá húsarhaldinum, sum skal brennast. Posin skal standa í einum góðkendum stativi. Plássið, har posin stendur, skal vera gjørt soleiðis, at posin kann takast og flytast uttan trupulleikar og uttan vanda fyri heilsuskaða hjá innsavnararunum. Strekkið millum koyrivegin og ruskposan skal vera ljóst, fast, og so slætt og stutt sum gjørligt. Í flestu førðum merkir tað, at tann grái ruskposin skal standa í stativi við ta síðuna á húsunum, sum vendir út móti koyrivegi.

Tað er neyðugt, at vit øll royna at gera arbeiðsumstøðurnar hjá innsavnarunum so góðar sum gjørligt. Hugsa um, at teir innsavnararnir, sum koma í túnið hjá tær einaferð um vikuna, skulu í 400 til 600 onnur tún um dagin at taka ein posa, sum vigar 12 kg í miðal. Kanst tú stytta teimum gongdina nakrar metrar og ikki minst nøkur trapputrin, ert tú við til at bøta um arbeiðsumstøður teirra. Verður leiðin stytt t.d.10 metrar í miðal fyri hvørt húski, merkir tað 400 til 500 km stytri gongd um árið við 12 kg á bakinum fyri hvønn teirra, sum ber posan til bilin, ella einar 6 túrar færri millum Kirkjubø og Leirvík við 12 kg á bakinum. Annars verður víst til Reglugerð um ruskinnsavning frá 1994.

**Tann hvíti pappírsposin**
Tann hvíti pappírsposin skal brúkast til reint pappír og papp. Tann hvíti posin kann standa úti í regntøttum stativi, men hann kann líka væl standa inni, tí hann er bert ætlaður til reint og turt pappír og papp. Stendur hvíti pappírsposin inni, er tó neyðugt at seta hann út til gráa ruskposan, áðrenn innsavnararnir koma eftir posanum, tann dagin hann verður heintaður. Annars eru somu reglur galdandi fyri tann hvíta posan sum fyri tann gráa posan.

Innsavningin av pappíri frá húsarhaldum verður sett í verk í stigum sum víst er í Talvu 1. Byrjað verður í Eysturoynni og Norðstreymoynni. Hvørt húski fær teir pappírsposarnar, sum tað hevur brúk fyri til februar næsta ár. Í heyst fáa norðoyingar og vágafólk sínar pappírsposar. Fyrst í 2002 byrjar innsavningin av pappíri í Suðuroynni og Sandoynni.

Fimtuhvørja viku verður bæði tann hvíti pappírsposin og tann grái plastposin heintaður sama dag. Í fyrsta umfari fær hvørt húski allar teir pappírsposarnar, tað hevur brúk fyri til februarmánaða í 2002. Síðani fær hvørt húski í IRF-økinum allar pappírsposarnar til eitt ár í senn.

**Tann grøni posin**
Tann grøni posin er til serliga dálkandi burturkast. Tann grøni posin verður framvegis savnaður tvær ferðir um árið. Lýst verður í fjølmiðlunum, nær innsavningin fer fram. Tann grøni posin má verða settur til gráa ruskposan, áðrenn innsavnararnir koma, tann dagin hann verður heintaður. Tað er sera umráðandi, at bundið er um kjaftin á grøna posanum, so at børn ikki sleppa niður í posan.

**Bingjuplássini**
Allar kommunur skulu hava eitt bingjupláss. Kommunan ræður yvir, hvar plássið liggur, hvussu tað er opið, og um tað er mannað, tá tað er opið. IRF letur bingjurnar og røkir tær.

Bingjuplássið er ætlað til burturkast frá húsarhaldum, sum ikki hóskar at lata í vanligu ruskposarnar. Harafturat kunnu plássini eisini brúkast til vanligt húsarhaldrusk, tá ið nøgdin er so stór, at pláss ikki er í rætta posanum.

Neyðugt verður, at kommunurnar skipa bingjuplássini soleiðis í framtíðini, at møguleiki verður fyri at lata skilt rusk frá sær á bingjuplássunum. Treytin fyri, at IRF setur fleiri bingjur til skilt rusk og burturkast inn á bingjuplássini er, at pláss er fyri teimum og at bingjuplássini eru mannað, tá tey eru opin.

Á bingjuplássunum, sum eru mannað, skal vera møguligt at skilja ímillum:

- burturkast, sum skal brennast,
  blandað rusk, lívrunnið tilfar, timburleivdir, vátt og skitið papp og pappír v.m.
- papp, sum skal endurnýtast,
  pappeskjur, bylgjupapp v.m.
- jarn og metal, sum skal endurnýtast,
  hvítvørður, hitaketlar, súklur v. m.
- glas, sum skal endurnýtast,
  øll vanlig glasíløt og fløskur
- elektronikkur, sum skal endurnýtast/serviðgerast
  útvørp, sjónvørp, teldur v.m.
- burturkast, sum skal tyrvas
  rotviðgjørdur vigur, rútaglas, bilrútar v.m.
- serliga dálkandi burturkast
  málingaleivdir, ljósrør v.m.
- bildekk, sum skal endurnýtast

Kommunurnar hvør sær ella saman gera av, hvussu plássini verða skipaði í komandi árum. Tað er sera umráðandi, at plássini eru opin soleiðis, at tíðirnar hóska til so nógvar av íbúgvunum í kommununi sum gjørligt, og serliga til yngru familjurnar, sum hava ein rættuliga pressaðan gerandisdag við børnum, arbeiði, húsi o. s. fr. IRF hevur ætlan um at skipa fyri skeiði fyri vegleiðarum á bingjuplássum. Ivast tú í onkrum, spyr so vegleiðaran á bingjuplássinum ella set teg í samband við IRF.

Í felag fáa vit eitt HEILT OG REINT umhvørvið.








Nýggi tele- og internetveitarin

# Gerst royndarkundi hjá Kalli
## -og spar yvir 25%



Nú kanst tú gerast royndarkundi hjá Kalli. Vit hava í løtuni omanfyri 300 royndarkundar, og skulu hava 200 afturat. Sum royndarkundi fært tú 25% í avsláttri í mai og juni av okkara prísum, sum frammanundan eru upp í 33% bíligari enn prísirnir hjá Føroya Tele.

**Ókeypis KallNet**
Allir okkara kundar fáa ókeypis KallNet (internet). Tú skalt bert gjalda fyri nýtsluna, sum sjálvandi eisini er 25% bíligari í royndartíðini. Frammanundan eru nýtsluprísirnir bíligari enn vanligu prísirnir hjá Føroya Tele.

**Tað er lætt at gerast kundi**
- Tú varðveitir sama nummarið
- Tað er ókeypis at gerast kallkundi
- Tað tekur bara 5 minuttir at gerast kundi.

**Síðsta útkall**
Síðsta útkall at taka av hesum tilboði er 1. mai í ár.

**Ring nú leygardagin**
Tú kanst ringja leygardagin 21. apríl frá kl. 10.00 til 16.00, ella gerandisdagar frá kl. 9.00 til 18.00.

**Ring 20 20 20**
leygardagin 21. apríl frá kl. 10.00 til 16.00,
ella gerandisdagar frá kl. 9.00 til 18.00.

kall
*Orðið er títt*

Kall · Óðinshædd 2 · Tel 20 20 20 · Fax 20 20 21
Postrúm 3298 · FO-110 Tórshavn · kall@kall.fo · www.kall.fo